DAGSINS MEINING

Miðvís ætlan at halda C uttanfyri

Síðani næstseinasta val og eftir hetta valið hava vit hoyrt løgmann tosa um eina breiða samgongu. Hetta hevur hann endurtikið so oftani, at fólk munnu vera rættiliga illa við fyri ikki at siga forfard, nú sami løgmaður velur ta smalastu samgonguna, ið hugsast kann. Formenninir í stóru andstøðuflokkunum siga, at orðini hjá løgmanni um eina breiða samgongu eru bert innantóm orð uttan nakað hald í veruleikanum. Og uttan nakran veruliga vilja aftanfyri.

Serstakliga er tað formaðurin í Javnaðarflokkinum, ið kennir seg ikki sørt sviknan av løgmanni, nú hesin so oftani hevur tosað um eina samgongu við teimum gomlu samgonguflokkunum og so Javnaðarflokkinum. Hetta var so eisini tann samgongan, ið løgmaður meldaði út sum skilabesta møguleikan eftir fundin innanhýsis í flokki sínum. Hann helt ikki, at Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin lógu longur frá hvørjum øðrum, enn at hann vildi royna seg sum semingsmann. Tað var bara spurningurin um at fáa nakrar orðingar uppá pláss um løgregluna og rættarskipan. So var tann samgongan heima. Ja so einfalt og lætt ljóðaði hetta frá løgmanni.

Men veruleikin skuldi so vísa seg at verða ein heilt annar. Tí eftir øllum at døma ynskti løgmaður ikki eina breiða samgongu meta vit út frá tí , ið veruliga hendi. Løgmaður gjørdi so gott sum einki fyri at royna seg sum semingsmann í hesum føringum men fór heldur eftir Miðflokkinum, nakað, sum hann møguliga alla tíðina hevur havt í kvittanum. Fyrst at fyrigykla Føroya fólki, at hann virkuliga vildi hava eina breiða samgongu fyri síðani at seta í verk eina ætlan, sum bara hevur ligið og bíðað, nevniliga ta smølu samgonguna saman við Jenisi.

Nú vita vit sjálvandi ikki, hvat er fyriginið innan fyri múrarnar á Gamla Apoteki ella innanhýsis í Fólkaflokkinum. Men vitandi, at løgmaður hevur sitið og situr við allari maktini bæði í flokki sínum og í Tinganesi, so er greitt, at tað í síðsta enda er løgmaður sjálvur, sum einsamallur – suverent – ger av, hvønn hann vil hava í samgongu.

Tá hugsað verður um tær positivu útmeldingarnar frá løgmanni um eina samgongu, har Javnaðarflokkurin er við, standa mong í dag spyrjandi, hví sami maður nettupp var tann, sum forðaði fyri, at Javnaðarflokkurin kom við í eina samgongu. Hetta eftir at hava brúkt hann sum jarnbrot móti Tjóðveldinum og eftir at hava adopterað stóran part av sjálvstýrispolitikkinum hjá nettupp Javnaðarflokkinum ella at hava lagt seg á somu linju sum hann. Fólkaflokkurin tóktist vilja brúka Javnaðarflokkin í samgongutelvingini til at gera Tjóðveldisflokkin meira moyran og at vilja reka ein meira hóvligan sjálvstýrispolitikk. Tá hetta var komið uppá pláss var ikki longur brúk fyri Javnaðarflokkinum. Og løgmaður fór eftir tí bíðandi Jenisi, tí við honum kundi hann sjálvur varðveita mest møguligt vald í Tinganesi. Soleiðis gekk kabalan hjá løgmanni upp enn einaferð. Lítið sømuligt fyri ein løgmann. Eftir stendur tó eisini tann ósvaraði spurningurin um tað eisini var Tjóðveldið, sum kravdi av løgmanni, at Javnaðarflokkurin av persónligum orsøkum skuldi haldast uttanfyri. Og um so var, hvat noyddi løgmann at gera eftir teimum boðunum! Kanska eftirtíðin fer at kenna tað svarið. Í hvussu er kunnu vit staðfesta, at her varð ikki spælt við ærligum kortum og enn minni orðum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Mín meining

Mourits Mohr Joensen

Góðu háttvirdu politikkarar.

Eg má gera eina viðmerking til hasa ørvitis ferjubygging (eftir mínum høvdi), sum tit hava góðtikið at byggja til Suðuroyar.

Eg veit ikki hvør ella hvussu nógv hava verið uppi í teimum fyrstu byrokratisku fyrireikingunum til hesa garvillu verkætlan.

Men, eftir at hava ligið í einum verkfalli í skjótt ein mánaða hvar alt hevur ligið lamið, hava vit hoyrt um hvussu illa útjaðarin og ikki minst Suðuroyggin er fyri. Men so byrjaði ferjusambandi aftur, og alt er so smátt farið at virka aftur, so frætt tað nú einaferð kann.

Men, so Guð náði tú meg, um ikki tit hava sent Smyril á skipasmiðju, uttan at hava hugsa hvussu sambandið til Suðuroynna skal rekast. Hasin stakkals stjóri á SSL, hevur víst á hetta fyri langari tí síðan, men løgtingsvalið var ov tætt við, so tit gloymdu nokk hetta málið.

Tað var bert at fáa atkvøtt fyri nøkrum mill. kr. til eina nýggja ferju til Suðuroyar, so skuldi alt verið gloymt, og møguligvís onkur mintist at tit atkvøddu fyri hasum pengunum, ja, bæði til ferjur, undirsjóvartunnlar og valagn.

Í øllum hesum gloymdi tit alt Føroya fólk, tí tað er Føroya fólk, ið skal gjalda rokningina fyri ferjuna til Suðuroynna. Nú mugu suðuroyingar ikki halda at eg eri í móti einu ferju til suðuroyar, nei, tvørtur ímóti, eg vil hava tvær ferjur.

Ja, tygum hava lisið rætt, tvær ferjur. Tí hvat í Himmalsins navnið skulu tit gera um X ár, tá ið hesin nýggi Smyril skal á skipasmiðju? Møguliga kunnu tit seta Másan inn í siglingina.

Tað byrjaði við at Sámal Petur nærmast gav Teistan sum eina aðra jólagávu, og tað sama við Ólavi Halga, eg minnist ikki hvat søluprísurin var, men eg meini at Teistin fór fyri 11 mill. kr. og Ólavur Halgi fór fyri 800.000 kr. ella har á leið.

Tað er ein tann størsta skandalan, ið er hend innan tann almenna flutningin. Faktisk øll strandferðslan lammaðist av hesi dáragerð, pluss at Palliba fær eina rokning uppá 500 mill. kr. Nei, tá ið Teistin og Smyril vóru, gekk alt í besta lag.

Nú hava politikkarnir góðtikið eina verkætlan, sum snýr seg um at byggja eina ferju, sum skal kosta gott og væl 300 mill. kr., ferjulegu á Lítlahólmi á Trongisvágsfirði, mettur kostnaður 100 mill. kr., ferjulegu í Vági 50 mill. kr. og ferjulegu í Havn 75 mill. kr í alt 525 mill. kr. Minnist tú góði lesari, hetta er alt mettur kostnaður, og tað vita vit hvat ið tað kann føra til, tí næstan allar almennar verkætlanir kosta meir enn ætlað.

Sjálvandi sigur onkur politikkari. Nú, nú, steðga nú eitt lítið sindur, tú hann sjálvir. Landskassin skal ikki gjalda alt, komunurnar skulu gjalda sín part. Tað vil ein og hvør Palliba leggja líka dáin á, tí tað er álíkavæl skatturin hjá honum, ja, øllum Pallibaðum í Føroyum, og tonk um tú kann, at byggja eina ferju sum bert kann leggja at í Havn, suðuri á Tvøroyri og við ein pier í Vági, sum er settur við lóg á tingi Føroyinga. Suðuroyggin er nakað long sum er, tí vegasambandið er so ringt. Men tá tað er gjørt, styttist hon nógvar minuttir, tí tímar kann tað ikki blíva, tí tá hevur ein koyrt hana upp og niður fleiri ferðir.

Hvat nú, um teir bygdu tvey skip sum vóru samaslag sum Mols Smyril, ella nakað minni, tey kostaðu ikki hasar 525 mill. kr. Men hvat um tey so kostaðu tað sama, tí so høvdu vit tvey fin skip, sum kundu siglt dupult túrar til Suðuroynna, eisini kundi tey siglt til allar tær størru havnirnar í Føroyum, uttan at broyta ferjulegur, og uttan at hugsa um veður og vind. Tí, eru tað nøkur skip sum hava roynst væl, eru tað akkurát Mols ferjurnar. Og er tað tann hálvi tímin tað strandar uppá, so er at seta 500 HK meira á básarnar niði í kjallaranum. Eisini eru fólkini, sum eru tengd at sambandinum um Vestmannasund, klár at seta umborð á eina av hesum nýggju ferjum. Um tað nú var, sum her er filisoferað um, so hava vit ongar trupulleikar av at seta ta einu ferjuna av til skipasmiðu, tí vit hava eina at seta í staðin. Og tá fast samband er komið ímillum Sandoyonna og Streymoynna, ja, so er Smyril klárur at seta í sigling inn á Hvalba, tí tá eru bergholini og vegirnir breiðkaðir. Tí fast samband ímillum Sandoyggina og Streymoyggina kann ikki loysa seg peningaliga, uttan at Suðuroyggin er tegnd uppí tað sambandi.

Tá ið vit nú eru við ferjur og ferjulegur, kann eg ikki lata verða við at gera viðmerkingar til ferjuleguna niðri á Bursatanga. Tað kann ikki vera rætt, at tað er samtykt av øllum þortum at hatta øki er egnað, tí tað kann ein og hvør fyrsti flokkur, úr einum og hvørjum skúla í landinum rokna út, at har verður speril í. Tað er bert at hyggja eftir, hvussu tað er tá ið Havnarmenn eru í grind, øki niðri á Bacalao er alt fult í bilum, og allan vegin niðan Skipasmiðjubrekkuna á báðum síðum, og víðari heimeftir framvið hjá Kjartani og Dennu, og úteftir framvið hjá Axel og Edith í J. C. Svabosgøtu. Har eru um 450 bilar, og tað vita vit hvussu standurin plagar at verða har. Hugsi tykkum táið Norrøna skal avstað, tað koma 300 bilar, og tað skulu 300 bilar við aftur, og aðrir 100 eru og siga farvæl við ferðandi, og aðrir 100 eru og taka ímóti ferðandi, tað eru 800 bilar í alt, sum skulu avgreiðast innan 3- 4 tímar. Og síðan skal tað verða pláss fyri teimum bláu og reyðu bussinum, og um Smyril, ella okkurt av stóru ferðamannaskipunum eru samstundis sum Norrøna, ja, so er sperilin skrædnaður fleiri ferðir. Hvussu í Himmalsins navnið, skulu tit herberga øllum hesum bilum?. Og hvat um tað hendir ein og hvør ólukka, eldur í einum av húsinum, ella onkur dettur á sjógv, ella um ringast vil til, um tað kemur eldur í Norrønu???. Tað sleppur ikki ein einasti hjáparbilur ígjøgnum. Til og frárensli av Bursatanga er ikki nógv broytt, síðan eg var eini tíggju ára gamal fyrst í hálvfjersunum. Smogan oman og niðan við hjá Handilsforeiningini (Cafe Natúr), er tann sama sum hon hevur verið í einar tvær øldir, Jónas Bronks er broytt við eini rundkoyring, ímeðan Strandarveðurin er tann sum er broyttur mest, men neyvan er hann ætlaður til parkeringsøki.

Nei, her má vera eitt av tveimum, samferðsluhavn, ella góðshavn. Munnu Vestmenningar ikki hava eitt gott hugskot til Norrønu, nú fast samband verður til Vágarnar, har er so at siga alt klárt. Annars eru øki inni á Sundi, Kollafirði Skálafirði og møguliga Gamlarætt, um tað er so alneyðugt, at tað skal verða miðøki.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndameni:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Kom óvart á Smyril Line

Boðini frá týsku skipasmiðjuni um, at hon biður um gjaldsteðg, komu óvart á Smyril Line. Leiðslan í Smyril Line er farin til Týsklands á fund við skipasmiðjuna

SKIPASMÍÐ
Edvard Joensen

Týska skipasmiðjan, sum smíðar nýggju Norrønu, hevur biðið rættin um at sleppa í gjaldsteðg. Skipasmiðjan hevur boðað Smyril Line frá hesum, og øll leiðslan í Smyril Line situr í dag á fundi við skipasmiðjuleiðsluna.

Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, segði við Sosialin í gjár, at tey vistu einki meira enn, at skipasmiðjan var komin í figgjarliga trongstøðu, og hevði biðið um gjaldsteðg.

– Sjálvandi er tað eitt forskrekkilsi at fáa, men tey hava verið so mong, tók hann til, og legði samstundis dent á, at hann hevði fingið at vita frá skipasmiðjuni í gjáramorgunin, at tað framvegis varð arbeitt sum vanligt upp á Norrønu.

Óli Hammer vónar, at landspartastjórnin í Schleswig-Holstein fer at leggja uppí og fáa greitt málið.

– Tað eru hóast alt eini 800 arbeiðspláss, sum standa í vága, so tað er ikki smávegis, sigur hann. Norrøna stendur hálvliðug á skipasmiðjuni umframt tvey onnur næstan liðug skip fyri eina milliard, sigur stjórin á Smyril Line.

Hann sigur, at Smyril Line hevur onga ábending fingið um slíka støðu hjá skipasmiðjuni í seinastuni.

– Einaferð seinasta heyst segði skipasmiðjan fólki upp, men tað hildu vit vera farið nú, sigur Óli Hammer.

Arbeiðið upp á nýggju Norrønu gongur enn sína vanligu gongd

Vónar skottryggan sáttmála

Vónandi er sáttmálin millum Smyril Line og týsku skipasmiðjuna skrivaður soleiðis, at Smyril Line ikki missir pengarnar, um skipasmiðjan fer á húsagang, sigur føroyskur skipsmeklari

SKIPASMÍÐ
Edvard Joensen

– Tað ringasta, sum henda kann í málinum um gjaldssteðgin hjá týsku skipasmiðjuni, sum smíðar nýggju Norrønu, er, at Smyril Line missir bæði skip og pengar.

Tað sigur Torleivur Mikkelsen, skipsmeklari í Havn, sum vónar, at smiðjuni stillar eina ófrávíkiliga trygd fyri, at Smyril Line í øllum føroum fær allar sínar pengar aftur, um skipasmiðjan fer á heysin, sigur Torleivur Mikkelsen.

Av øðrum møguleikum at koma burtur úr støðuni, sum hon er vorðin í dag, nevnir hann, at landspartastjórnin kemur upp í og ger tey trý skipini, sum eru í gerð, liðug, áðrenn skipasmiðjan møguliga verður afturlatin. Tað er ein máti, sum plagar at verða brúktur í slíkum støðum, sigur hann.

Ein annar møguleiki er, sigur Torleivur Mikkelsen, at skipasmiðjan fer á húsagang og verður seld. Tað ringsta, sum tá kann henda, er at keyparin bara tekur sjálva skipasmiðjuna, men ikki vil vita av nýbygningunum, sum inni standa.

Hendir tað, er alt farið, um ikki ein ófrávíkilig trygd er staðfest í byggisáttmálanum, sigur hann.

Argjabørn á Katholti

Ein skúlaflokkur av Argjum fór mánadagin til Svoríkis at vitja í kenda Vimmerbýi, sum mestsum er gjørdur til Astrid Lindgren savn burturav. Tey ætla eisini at vitja grøvina hjá rithøvundanum, sum varð jarðað har sunnudagin

FERÐALAG
Edvard Joensen

Flokvøllurin: 5. b í Argja Skúla, sum hetta seinasta skúlaáríð hevur arbeitt við tekstum hjá kenda, svenska barnabókarithøvundanum, Astrid Lindgren, fór mánadagin við flogfarinum hjá Atlantsflogi til Danmarkar, haðani tey fara til Vimmerby í Svoríki, har øll kendu Lindgrenstøðini eru at síggja.

Ferðalagið fer fyrst til Danmarkar, har steðgað verður á eina nátt, áðrenn tysdagin verður farið víðari til Svoríkis.

Í Vimmerby verður steðgað í fimm dagar, har av tveir dagar burtur av verða brúktir í Astrid Lindgren World, har næmingarnir fara at møta kenningum sum Emili úr Lønnebergi, Pippi Smokkuleggi og Karlson á takinum.

Farið verður eisini ein túr í Dundurdal at síggja, hvar filmurin um Børnini í Dundurdali varð tikin upp.

Ein av døgunum verður vitjað í Lilla Landet, sum er ein park, ið bygd er upp sum Svoríki í minni mun. Har ber til at síggja landsløg og bygningar, sum eyðkenna Svoríki.

Astrid Lindgren varð endaliga jarðað í Vimmerby sunnudagin, og væntandi fara næmingarnir í Argja Skúla eisini at vitja á grøvini hjá kenda høvundanum, sum tey nú vita so nógv um.

Tey hava fingið ymiskt við sær á ferðina, so sum húgvur og blusur, eins og pennar og pengapungar frá ymsum føroyskum fyritøkum.

Sumt av hesum fara tey millum annað at geva sum gávu til næmingarnar í einum fimta flokki í Astrid Lindgren Skolan í Vimmerby, sum tey fara at vitja. Tey hava ikki havt samband við hendan skúlan fyrr enn nú, beint áðrenn tey fóru avstað. Tá ringdi lærarin til skúlan og spurdi, um tey kundu koma at vitja, og tað var gaman í.

Afturkomin til Danmarkar fara tey at steðga á í Keypmannahavn einar tveir dagar, siga tey. Har fara tey millum annað at vitja djóragarðin, Planetarium og Eksperimentarium.

Í ferðalagnum eru 24 næmingar, seks foreldur og tveir lærarar. Tey fara at búgva í smáum frítíðarsmáttum, meðan tey eru í Svoríki, greiðir Lissy Hansen, sum er lærari hjá 5.b í Argja Skúla, frá.

5.b í Argja Skúla fór mánadagin til Vimmerby í Svoríki, har tey millum onnur fara at hitta ispegilin Emil úr Lønnebergi

Mynd: Edvard Joensen